# Føroysk lesandi á mentanarnátt í Keypmannahavn

**MFS gevur lesandi høvi at sýna handverk/kundskap/-list fram á Kulturnat í Keypmannahavn í oktober**

MENTANARNÁTT
*Tíðindi frá MFS*

Aftur í ár verður Føroyahúsið við í mentunarnáttini, sum verður í Keypmannahavn 11. oktober 2002. Fyri fyrstu fer gevur MFS lesandi høvi at sýna fram sína list, handverk, kundskap o.a.

Hetta er ein góður møguleiki hjá lesandi at sýna ymiskt fram tað, ið upptekur tey og á tann hátt skapa áhuga og fremja umrøðu.

Ætlanin hjá MFS er at fremja áhugamál teirra lesandi og birta uppundir kjak og virksemi í felagnum við hesum tiltakinum.

Alt tilfar, sum kemur til høldar, verdur lagt út á heimasíðuna hjá MFS - www.mfs.fo, har høvi verður at koma við viðmerkingum, umtalu, ummælum, áskoðanum, rósum vm.

## Luttøka

Fyri at luttaka nýtist tær bert at skriva mail til www.bjorgdam@hotmail.com og greiða frá ætlan, tema, plásstørvi o.líkn og at vera limur í MFS.

Limaskapur kann fáast við venda sær til skrivstovuna hjá MFS ella á heimasíðuni.

Eru spurningar ella ivamál, ring til Bjørg Dam á tlf. 32 88 60 06.

## MFS?

Er Meginfelag Føroyskra Studenta og heldur til í Føroyahúsinum í Keypmannahavn, og tekur sær av áhugamálum teirra lesandi uttanlands og teimum, ið eru undir hægri lesnaði í Føroyum.

## Hvat er Kulturnat?

Mentunarnátt var fyrstu ferð 15. oktober 1993, og síðani er mentunarnáttin blivin eitt størri og størri tiltak.

Í 2001 vóru meira enn 300 stovnar við, og yvir 52.000 atgongumerki vóru seld. Høvuðsætlaninar við tiltakinum er at birta lív í tað mentunarliga lívið við at bjóða fjølment tiltøk og at seta Keypmannahavn á verðinskortið sum ein mentunarbýur.

Í ár verður sum undanfarnu ár ymiskt forvitnisligt í Føroyahúsinum, tað er ein »tour de fource« ígjøgnum norðuratlantisku mentanina – drama, kabaret, føroyskur dansur, kórsangur, kingosangur, framsýningar av alskins slag, upplestur og alt møguligt annað.


†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at

**Salmina Johannesen**
Skopun

andaðist sunnudagin 25. august, 83 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju mikudagin kl. 13.00.

**Børnini**



**Tøkk**

Við hesum veita vit okkara hjartans tøkk til øll, sum vóru við til jarðarferðina hjá

**Sofíu Joensen**
Sandavágur

Takk til David, prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar og øll, sum fylgdu henni til seinastu hvíldina.

Ein serstøk tøkk til Helenu og øll á Ellisheiminum, sum vóru so góð við hana og vóru um hana seinastu mongu árini. Harrin signi tykkum!

*Familjunnar vegna*
**Brynhild Higginbotham**


# EP-fløgan hjá Clickhaze útgivin í Danmark



**Mánadagin gav Cope Records EP-fløguna hjá Clickhaze út í Danmark. Fløgan fæst til keyps á heimasíðuni hjá felagnum og í fløgusølum ymsastaðni kring landið**

TÓNLEIKUR
*Pop.fo*

Nú fæst fyrsta útgávan hjá Clickhaze til keyps í Danmark. EP, sum bólkurin kallaði útgávuna, varð mánadagin givin út av plátufelagnum Cope Records.

Felagið selir sínar útgávur umvegis heimasíðuna hjá sær, men teir hava eisini avtalu við GDC, sum tryggjar at fløgurnar hjá teimum fáast til keyps í fløgusølum úti um landið.

Á heimasíðuni hjá Cope Records verður fløgan løgd fram við hesum orðum:

– Ud af Færøernes tågede landskaber kommer kvintetten Clickhaze, hvis sfæriske og atmosfærefyldte blanding af trip hop og avantgarde-rock gør brug af den blå nordiske tone på en helt säregen måde. Clickhazes drømmende lydlandskaber er bygget op omkring sangerinden Eivør Pálsdóttir alfeagtige vokal, som både indeholder vemod og skønhed blandet på forunderlig vis.

Tað ber til at lesa meira um EP-fløguna hjá Clickhaze á heimasíðuni hjá Cope Records – www.coperecords.dk

# Gott er góðum at tæna

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Næmingabókin »Gott er góðum at tæna 2«, ætlað kristniundirvísing í fólkaskúlanum, er nú komin í bókabúðirnar saman við lærarahefti til bókina. Paulina Andreasen og Charlotta Thorsteinsson, lærarar, hava skrivað bæði næmingabók og lærarahefti. Eitt høvuðsgrundarlag undir næmingarbókini er »Bíblian í orðum og myndum«, sum Bókadeildin hjá Føroya Lærarafelag gav út fyri nøkrum árum síðan. Fyrru næmingabókina, saman við lærarahefti, gav Føroya Skúlabókagrunnur út í 2000.

Ætlanin við næmingabókunum er millum annað at læra næmingarnar betur

- at skilja bíbilsku tilburðirnar
- at viðgera siðalagsligar spurningar í bíbilskum ljósi
- at styrkja fatan næminga av egnum sjálvsvirði og av sjálvsvirðinum hjá øðrum




Harumframt er fjølbroytt tilfar til tekstir úr øðrum bókmentum, ið lýsa siðalagsligar spurningar.

Okkara tíð hevur mangt við sær, ið ávirkar viðbrekna barnasinnið. At læra at skilja ímillum rætt og skeivt, satt og ósatt, gott og ilt er framvegis ein av hornasteinunum í okkara uppaling. »Gott er góðum at tæna 2« umrøðir evni so sum lygn, samvitsku, lýdni, øvund, happing, dálking og kærleika. Høvundarnir vísa í sini greiniligu lærarabók, ið er gjørd til næmingabókina, til mong góð hugskot, har sum næmingarnir fáa høvi til at nýta síni skapandi evni. Eisini verður víst á ymsar møguleikar fyri tvørgreinaligari viðgerð og á evni til verkætlanaruppgávur hjá eldru næmingunum.

»Gott er góðum at tæna 2« kann nýtast í miðdeildini í fólkaskúlanum, men bókin kann saktans eisini verða brúkt í framhaldsdeildini.

Hestprent hevur prentað.

Næmingabókin »Gott er góðum at tæna 2« er 67 blaðsíður, og læraraheftið til næmingabókina er 20 blaðsíður.



# Steinur á rull í Kirkjubø



*Pílurin vísir steinin, sum endaði góðan metur frá húsinum*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*



*Menn frá Landsverkfrøðinginum saman við Annfinni Brekkstein, borgarstjóra og Eyðfinni í Búðini, bygdarráðslimi, eru á veg niðan at kanna skorina. Pílurin vísir, hvaðani steinurin leyp*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

**Um níggjutíðina í fríggjakvøldið fór ein eitt tons tungur steinur á rull úr skorini oman fyri Kirkjubø. Steinurin steðgaði góðan metur frá einum sethúsum**

OMANLOP
*Eirikur Lindenskov*

Tey vóru heppin í Kirkjubø fríggjakvøldið, tá ein steinur fór á rull úr skorini oman í bygdina. Steinurin rullaði oman gjøgnum bøin, tvørtur um vegin, og steðgaði í túninum góðan metur við síðuna av einum sethúsum. Á veg oman í túnið rakti steinurin eina trækrúnu, sum hevur tikið ferðina av steininum, sum annars hevði beina kós oman í stóra vakstrarhúsið í Kirkjubø.

Fólkini í húsinum boðaðu løgregluni frá tilburðinum. Løgreglan bað fólkini fara úr húsinum, tí óvist var, um fleiri steinar vóru væntandi.

Leygarmorgunin var greitt, at annar steinur eisini stóð at leypa. Hann var um trý tons til støddar, og tí vórðu boð send eftir Landsverkfrøðinginum at meta um, hvat gerast skuldi.

Kl 10 leygarmorgunin fóru Annfinn Brekkstein, borgarstjóri og Eyðfinnur í Búðini, næstformaður, saman við tveimum staðkendum monnum frá Landsverkfrøðinginum at kanna steinin.

– Steinurin er nú tjóðraður, so nú fer hann ongan veg, sigur Annfinn Brekkstein.

Hann sigur, at tey nú ætla at fáa fólk frá Jarðfrøðissavninum at kanna alla skorina, tí menninir frá Landsverkførðinginum varnaðust, at alt ikki var, sum tað plagdi.

– Tá skoran er kannað, verður gjørt av, hvat gerast skal fyri at tryggja viðurskiftini, sigur Annfinn Brekkstein.

Borgarstjórin í Kirkjubøar kommunu er sera fegin um, at smáu kommunurnar hava ein stovn sum Landsverkfrøðingin at venda sær til í slíkum føri.

– Vit í teimum smáu kommununum hava ikki so nógvar møguleikar, tí er tað sera gott, at vit altíð kunnu heita á Landsverkfrøðingsstovnin í slíkum førum, sigur Annfinn Brekkstein, sum leggur afturat, at arbeiðið í Kirkjubø varð greitt skjótt og fyrimyndarligt leygardagin.





Tú ert millum 13 og 25 ár. Alt annað er líkamikið. Dámar tær 1nú romantiskar tónar, tá ið tit eru 2eini? Ert tú tann seigi, sum einsamallur 3vur í Ormin Langa, ella hin bragdliga, sum altíð skalt 4 nakrar flatar? Setur tú hvørt 5oyra inn á kontu ella keypir tú heldur 6tanda parið av diesel-buksum? Nýforelskaður og í 7. himni, ella bert tú als ikki 8 fyri at vera single? Eisini líkamikið! Fá tær bara eitt av spildur9 +kortunum frá Føroya Sparikassa. Tú kanst velja millum 10! Við egnum nick-navni, sjálvandi ;)

Bílegg títt +kort í Føroya Sparikassa. Eisini um tú hevur eitt frammanundan. Hav eina passmynd av tær sjálvum við. Tú fært nýggju stakfløguna hjá Brandi Enni beinanvegin – ókeypis!

**Plusspakkin:** Í plusspakkanum eru tvær kontur og eitt +kort. Fyrra kontan, +Spar, er bundna sparikontan. Seinna kontan er +Kontan. Hon er brúkskonta við tínum serstaka +korti.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo